**Jacob Vestergaard**
**vegna Fólkaflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 102/2015: Uppskot til løgtingslóg um verju av staðsettum uppmátingarmerkjum**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um verju av staðsettum uppmátingarmerkjum**

**§ 1.** Til tess at tryggja grundstøðið undir geodetisku uppmátingini av Føroyum eru øll staðsett uppmátingarmerki friðað.
*Stk. 2.* Sum staðsett uppmátingarmerki verða roknað fixpunkt, sum í lendinum eru eyðmerkt við bronsu- ella koparmerki, ella á annan serligan hátt.
*Stk. 3.* Ein listi yvir øll staðsett uppmátingarmerki, friðað eftir hesi lóg, er hjálagt sum skjal 1.

**§ 2.** Starvsfólk hjá kortmyndugleikanum hava uttan rættarúrskurð atgongd til øll staðsett uppmátingarmerki, sum eru friðað eftir hesi lóg.

**§ 3.** Er tað av einhvørjari orsøk neyðugt at flyta ella burturbeina eitt staðsett uppmátingarmerki, friðað eftir hesi lóg, skal kortmyndugleikin frammanundan hava givið skrivligt loyvi til hetta.
*Stk. 2.* Verða staðsett uppmátingarmerki burturbeind sbrt. stk. 1, hevur kortmyndugleikin ábyrgdina av at strika fixpunktið av listanum yvir friðað uppmátingarmerki.

**§ 4.** Tann, sum uttan loyvi frá kortmyndugleikanum flytur, tekur burtur, skaðar ella oyðileggur fixpunkt, ið eru eyðmerkt, ella sum hann átti at havt kunnleika um, verður revsaður við bót, og skal gjalda kostnaðin av at seta tey aftur. Verður brotið framt við vinningi fyri eyga, verður bótin hækkað.
*Stk. 2.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
*Stk. 3.* Málini verða viðgjørd sum løgreglumál. Rættartiltøkini í kapitli 72 í rættargangslógini um at leggja hald á og í kapitli 73 um rannsókn eru tó galdandi í sama mun sum í málum, sum verða viðgjørd av statsadvokatinum.

**§ 5.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2017.
*Stk. 2.* Samstundis verður sett úr gildi "Lov nr. 318 af 16. December 1931 angående Geodætisk Instituts trigonometriske Stationer m.v."

**Skjal 1**

| PUNKTNR | LÝSING | E29ETRS89 | N29ETRS89 | FVR09 |
|---|---|---|---|---|
| 11499 | Í steini | 622480,35 | 6809606,07 | 81,65 |
| 12808 | Vágur Ey. GPS | 617357,43 | 6817581,20 | 48,49 |
| 17811 | Heimari Gálgi. Í steini. GPS | 616829,59 | 6824846,26 | 51,37 |
| 20815 | Fyrr 20243. GPS | 609526,71 | 6831785,20 | 10,69 |
| 24029 | | 622907,30 | 6852495,68 | 55,74 |
| 26347 | | 622633,40 | 6857539,43 | 31,57 |
| 27185 | Skopun | 611175,71 | 6865469,47 | 21,74 |
| 27816 | Klettur. MS-pláta | 614490,11 | 6858127,61 | 37,42 |
| 28727 | | 595704,04 | 6881131,43 | 91,30 |
| 30012 | Stálboltur. GPS | 589523,04 | 6882859,82 | 82,85 |
| 32024 | | 581619,70 | 6887180,73 | 56,17 |
| 33014 | | 570751,60 | 6886155,87 | 34,98 |
| 33024 | Øvugt marknamerki | 570682,90 | 6886372,44 | 38,30 |
| 37088 | Nf Kirkjubø, niðanfyri vegin | 614645,39 | 6871714,10 | 30,48 |
| 37161 | Permanent GPS | 616086,67 | 6875869,73 | 53,98 |
| 43297 | | 601836,78 | 6888845,72 | 56,56 |
| 43325 | Í steini | 596040,79 | 6892050,12 | 85,84 |
| 45040 | Við Dúvugarð | 594807,37 | 6902864,65 | 56,78 |
| 48803 | Nesvík N. | 603236,45 | 6899540,24 | 5,98 |
| 51807 | Kjalnestangi. GPS | 610947,30 | 6889406,04 | 2,75 |
| 54285 | LV-pláta | 616662,98 | 6880763,45 | 42,64 |
| 55822 | Tinganes.Stálbol.Hæddarp.GPS | 616840,33 | 6877020,32 | 2,25 |
| 56002 | Raktangi. GPS | 616694,11 | 6886399,70 | 35,36 |
| 60908 | | 599161,44 | 6908961,20 | 34,76 |
| 61034 | | 606394,81 | 6911994,52 | 28,37 |
| 66041 | | 613587,94 | 6902056,70 | 21,13 |
| 67813 | Fyrr 67033. GPS | 619784,00 | 6899472,46 | 39,77 |
| 80023 | | 620984,85 | 6908816,79 | 61,14 |
| 84806 | Stálboltur. Niðan á Hædd | 625044,24 | 6901148,88 | 143,77 |
| 88022 | | 628285,37 | 6909790,54 | 9,81 |
| 92815 | Eiðvík. | 628498,60 | 6915951,49 | 38,90 |
| 93076 | Yviri á Ryggi | 637862,21 | 6907840,38 | 15,83 |
| 95019 | | 641163,17 | 6914114,10 | 75,62 |

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Í sambandi við skipanina av einum føroyskum kortmyndugleika er neyðugt at verkseta ta tilhoyrandi lóggávuna, og hetta lógaruppskotið er partur av yvirtøkutilgongdini. Lógaruppskotið hevur til endamáls at verja staðsett uppmátingarmerki við at friða tey.

Galdandi lóggáva um verju av staðsettum uppmátingarmerkjum er ein gomul donsk lóg frá 1931 (Lov nr. 318 af 16. December 1931 angående Geodætisk Instituts trigonometriske Stationer m.v.), sum sjálvsagt er merkt av tátíðar tøkni og tørvi. Tátíðarinnar uppmátingar vórðu gjørdar við sonevndari triangulatión, og tørvurin á uppmátingarmerkjum var tí ein heilt annar enn í dag, har GPS-tøkni fyri tað mesta verður nýtt. Størsti parturin av galdandi lógini snýr seg tí um treytirnar fyri møguligari ognartøku í sambandi við verjuna av staðsettum uppmátingarmerkjum. Lógin kom í gildi í 1931 og hevur verið galdandi síðani – bæði í Føroyum og í Danmark. Men sambært upplýsingum úr føroysku tinglýsingarskránni hevur eingin slík ognartøka verið í Føroyum. Hesar ásetingarnar í gomlu lógini verða tí mettar at vera óneyðugar, og tær eru tí ikki tiknar við í hetta lógaruppskotið.

Sambært ásetingunum í uppskotinum verða øll staðsett uppmátingarmerki (t.e. fixpunkt) friðað. Eitt fixpunkt er eitt uppmátingarpunkt í lendinum við kendari positión. Fixpunktini hava eitt Y- og eitt X-virði í eini krossskipan ella sum positión. Nógv fixpunkt hava eisini eitt Z-virði, sum er hæddin yvir sjóvarmálan. Vanliga eru fixpunktini eyðmerkt við einum kopar- ella bronsumerki, men tey kunnu eisini vera eyðmerkt við einum betongblokki ella sum hol í einum steini við einum trýkanti uttanum. Fixpunktini eru grundarlagið undir øllum uppmátingum í Føroyum, og tí er tað av stórum týdningi, at tey verða vard við friðing. Áherðsla skal tó leggjast á, at tað einans er neyðugt at friða sjálvi fixpunktini og ikki økið rundanum. Talan er somuleiðis einans um eina staðfesting av verandi støðu, og tí verður ikki mett, at nakar fíggjarligur missur verður av hesi lóggávuni.

Tey staðsettu uppmátingarmerkini í Føroyum eru umleið 7000 í tali og liggja bæði í bygdum øki og ymsa staðni í haga. Tað kann tí koma fyri, at útbyggingar av ymiskum slagi gera tað neyðugt, antin at burturbeina ella at flyta eitt fixpunkt. Í nógv teim flestu førum letur hetta seg gera uttan trupulleikar, men neyðugt er, at tað verður gjørt í einari skipaðari tilgongd. Tí verður skotið upp, at kortmyndugleikin (t.e. Umhvørvisstovan) skal føra ein almennan lista yvir øll fixpunkt í landinum, sum skal vera til skjals á internetinum. Er tørvur á at burturbeina eitt fixpunkt, skal kortmyndugleikin frammanundan hava givið loyvi til hetta, og yvirlitið yvir fixpunktini kann síðan dagførast samsvarandi.

Leggjast skal afturat, at føroyingar vísa markna- og uppmátingarmerkjum stóra virðing. Tað kemur sjáldan fyri, at hesi verða skalað, men tá tað hendir, er fyri tað mesta talan um ósketni. Ætlandi fer henda lóggávan at gera sítt til enn størri ansni.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

*1. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunu*

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar.

*2. Mettar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunu.*

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar av týdningi. Skrásetingin av fixpunktum er longu á Umhvørvisstovuni, og tí stendst neyvan nakað meirarbeiði av hesum lógaruppskotinum.

*3. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri vinnuna*
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

*4. Avleiðingar fyri umhvørvið*

Lógaruppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar við sær.

*5. Serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum*

Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

*6. Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir*

Uppskotið hevur ikki sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

*7. Hava millumtjóða sáttmálar við sær fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna.*

Um uppskotið verður samtykt, hevur eingin millumtjóða sáttmáli við sær fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna.

*8. Áleggur uppskotið fólki skyldur, t.d. upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi, skal verða greitt frá umsitingarligu avleiðingunum av hesum.*

Uppskotið áleggur fólki og vinnuni at biðja um loyvi frammanundan, um ætlanin er at burturbeina eitt staðsett uppmátingarmerki, ið nevnt er í fylgiskjali A.

*9. Verða heimildir lagdar til annan landsstýrismann ella til kommunur umframt kommunustýrislógina, skal greiðast frá teimum fyrilitum, ið grundgeva hetta.*

Við hesum uppskotinum verða ongar heimildir lagdar til annan landsstýrismann ella til kommunur umframt kommunustýrislógina.

*10. Fáa almennir myndugleikar atgongd til privata ogn, skal grundgevast fyri hesum og greiðast frá vavinum av heimildini.*

Lógaruppskotið gevur ongar nýggjar heimildir til atgongd til privata ogn, men staðfestir tær verandi atkomuheimildirnar til staðsett uppmátingarmerki. Um kortmyndugleikin skal røkja sínar skyldur, er neyðugt at hava atgongd til øll hesi merki, og henda heimild er tí ásett í § 2 í lógaruppskotinum.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1.** Greinin hevur til endamáls at friða øll fixpunkt og onnur uppmátingarmerki, ið eru nevnd í fylgiskjali A. Fixpunktini eru vanliga eyðmerkt við kopar- ella bronsumerki, men kunnu eisini vera eyðmerkt við einum steini við innslignum holi og tríkanti ella við einum betongblokki við holi í.

Upprunaliga vóru umleið 7000 slík punkt í Føroyum, men listin fevnir einans um uml. 10% av hesum. Eingin friðing er tí heft at møguligari burturbeining av slíkum punktum, sum ikki eru á listanum, men kortmyndugleikin skal tó hava eina fráboðan, tá staðsett uppmátingarmerki verða burturbeind.

**Til § 2.** Um tann føroyski kortmyndugleikin skal kunna røkja uppgávur sínar, er tað ein fortreyt, at atgongd er til øll tey staðsettu uppmátingarmerkini. Tí er neyðugt við eini heimild

til, at starvsfólk hjá kortmyndugleikanum uttan rættarúrskurð skulu fáa atgongd til øll staðsett uppmátingarmerki, sum eru friðað eftir hesi lóg.

Henda heimild er í verandi lógávu (Lov nr. 318 af 16. December 1931 angående Geodætisk Instituts trigonometriske Stationer m.v.”), og ein líknandi heimild er eisini við í lógaruppskotinum um ein føroyskan kortmyndugleika. Hildið verður tó at vera rættast, at atkomuheimildin eisini verður staðfest í mun til fixpunktini. Leggjast skal afturat, at tey flestu staðsettu uppmátingarmerkini á fylgiskjali 1 eru í haga.

**Til § 3.** Greinin ásetir eina skipaða tilgongd fyri, hvussu farast skal fram, tá staðsett uppmátingarmerki skulu flytast ella burturbeinast. Tann, sum hevur fyri neyðini at gera hetta, skal biðja um skrivligt loyvi frá kortmyndugleikanum (Umhvørvisstovuni), áðrenn tað verður gjørt, og rindar allar útreiðslurnar, sum standast av hesum. Hartil hoyrandi dagføringin av yvirlitinum yvir fixpunktini er tó ein myndugleikauppgáva hjá kortmyndugleikanum, og umsitingargjald kann tí ikki áleggjast fyri uppgávuna.

**Til § 4.** Revsiásetingar. Umframt at verða revsaður skal tann, ið ger seg inn á staðsett uppmátingarmerki altíð rinda kostnaðin av at seta tey aftur. Er brotið gjørt við vinningi fyri eyga, eigur bótin at hækka proportionalt í samsvari við vinningin av brotinum. Revsiábyrgdin fevnir eisini um løgfrøðiligar persónar.

**Til § 5** Gildiskomuregla. Málsøkið verður yvirtikið, og tí verður galdandi danska lógin sett úr gildi.

**Skjøl**
Skjal 1: Staðsett uppmátingarpunkt - Listi

**Á Løgtingi, 7. mars 2016**

Jacob Vestergaard

**Fylgiskjøl**
Fylgiskjal 1: Yvirlit yvir týdningarmikil uppmátingarpunkt - Kort